Vikuskiftis Sosialurin



# Fyrimunir við einum lítlum samfelag

**– Har manglar eitt meiri skipað samstarv millum barnagarð og fólkaskúlan. Í danmark riggar hetta heilt væl onkustaðni og tó minni væl aðrastaðni. Vit kundu verið fyrimyndin fyri onnur á hesum økinum. Vit hava fleiri fyrimunir hesum viðvíkjandi, orsakað av at okkara samfelag er so lítið, so sigur formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen**

DAGSTOVNAØKIÐ & FÓLKASKÚLIN

*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Pedagogfelag upplýsir, at slíkt samstarv finst í einstakum førum. Í barnagarði fyrireika tey seg til at fara í skúla, t.d. á Argjum er hetta rættiliga væl skipað. Men yvirordnað er eingin skipan hetta kundi verið betri, upplýsir Jarvin F. Hansen. Hetta skal styrkjast. Tí í hesum fyrireikingararbeiði opnast ein nýggjur heimur fyri børnunum.

– Vit kundu verið fyrimyndin fyri onnur á hesum økinum. Vit hava fleiri fyrimunir hesum viðvíkjandi, orsakað av at okkara samfelag er so lítið. Hví eftirapa okkum eftir øðrum londum? Eg haldi at vit gera hetta ov nógv. Men hartil skal sigast, at gransking og hagtøl mangla á økinum.

Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag, upplýsir, at eftir PISA-kanningini varð hetta økið umrøtt á fundi millum avvarðandi myndugleikar og starvsfólk. Har var m.a. frammi, at børn verða innskrivað í januar og febraur-mánað í tí árinum, sum tey skulu í skúla. Tá varð spurningur settur við, hví mann ikki innskrivar børnini eitt ár áðrenn skúlabyrjan og ásetir læraran eisini. Og um tað eru børn, við serligum tørvi – so kann lættari verða fylgt við teimum. Hann peikar á vansarnar við núverandi støðu, tá ið tað viðvíkur børn við serligum tørvi og eisini yvirhøvur.

– Barnið er sum eitt óskrivað blað, tá ið tað kemur í skúla. Tað er so flott, at stuðulin, sum barnið hevur, sleppur ikki í skúlan og stendur og bíðar eftir skúlatíð. Sama barn hevur ein stuðul í skúlatíð og so ein heilt annað stuðulspersón og ein annan form fyri stuðli eftir skúlatíð.

Fyri nógvum árum síðan bleiv tað í politiskum høpi sagt, at málsøkið er eitt gráøkið, tvs. at mann hevur verið í iva um, hvør skal hava ábyrgdina fyri hendan partin.

– Stuðulskipanin er undir Almenna og Heilsumálaráðnum, og skúlin undir mentamálaráðnum. Hetta hevur ligið í vegin.



*Á dagstovninum á Argjum er eitt rættiliga væl skipað samstarv millum skúla og barnagarð.*

Magnus Tausen slær fast, at har manglar ein samskipan á økinum og ein nýggjur máti at hugsa um barnið skal til.

– Í staðin fyri hugsa um barnið í 0-7, og so at byrja av nýggjum við áramálinum – 7 til uml. 16 ár. Og so aftur víðari og víðari – eisini eftir miðnámsskúlan, tá ið viðkomandi skal út á arbeiðsmarknaðin ella annað. Barnið ella persónurin kann t.d. hava ymiskar innlæringartrupulleikar. Vit kundu fingið nógv meiri burturúr eini betri samskipan á økinum og so er eisini neyðugt at hugsa barnið inn í eitt nógv longri tíðarskeið.

Málsøkið er skipað undir Almenna og Heilsumálum, og ikki undir Mentamálaráðnum, har skúlamál eru. Um hetta ávirkar samstarvið millum fólkaskúla og barnagarð er ikki staðfest, men hevur sum sagt verið frammi í politiska kjakinum.

Tey í Føroya Pedagogfelag kenna tað, sum at Dagstovnaøkið ikki verður raðfest í nóg stóran mun.

– Vit mangla umleið 200 pedagogar til at uppfylla dagstovnalógina, sum m.a. sigur, at 2/3 av arbeiðinum á einum dagstovni, skal vera útbúgvið fólk. Hetta er tað fyrsta, sum skal gerast. Hetta skal tó ikki skiljast sum um, at eg eri ónøgdur við hjálparfólkini, sum arbeiða á dagstovnum kring landi, als ikki. Men ofta hava hesi søkt inn á pedagogútbúgvingina og eru ikki sloppin.

Ætlanin er, at fleiri námsfrøðingar verða útbúnir til næsta ár.

Men Jarvin metir ikki, at beinleiðis skúlagongd skal vera á barnagarði.

- Men undir núverandi støðu haldi eg ikki, at vit skulu hava eina skipaða skúlagongd undan 1. flokki. T.d. er tað er jú munur á, hvussu gentur og dreingir búnast.

Føroya Pedagogfelag raðfestir ovast, at fleiri námsfrøðingar koma út. Jarvin F. Hansen upplýsir, at hvørt ár eru umleið 150 umsøkjarar og bara 25 sleppa inn.

– Men, tó kann mann uppbyggja samstarvið millum barnagarð og fólkaskúla upp samstundis, sum arbeitt verður við at fáa fleiri námsfrøðingar. Tí tað burdi ikki kostað so nógva orku at byggja hetta samstarvið upp.

www.sosialurin.fo

Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

- Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

# Eitt slag av líkasælu

**– Tað er eitt slag av líkasælu, at samstarvið millum barnagarð og fólkaskúlan er sum tað er, slær leiðarin á Dagstovninum á Argjum fast. Tey fyrstu árini, 0-7, eru av alstórum týdningi fyri barnið og samfelagið.**

*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Gudrun W. Rasmussen, námsfrøðingur og leiðari á Dagstovninum á Argjum, heldur, at eitt samstarv millum barnagarð og fólkaskúla skuldi verið skipað og nógv, nógv meiri av.

Á Argjum hava tey havt eitt slíkt samstarv í eini 5-6 ár. Hon greiðir frá arbeiðinum og letur væl at. Árið undan skúlabyrjan læra børnini, sum skulu í fyrsta flokk, týðandi tættir, sum hava við skúlagongd og innlæring at gera.

Áðrenn summarfrítíðina verða børnini, sum skulu í skúla, savnaði. Tað verður skrivað til hesi børnini um, at tey kunnu møtast á Frítíðarskúlanum. Har hitta tey komandi floksfelagar og fáa útflýggja eina mappu har tey verða kunnaði um hvønn annan, við myndum, nøvnum og øðrum.

– Børn eru forvitin og sera áhugaði í bókstavum og tølum. Vit arbeiða við slíkum, og vit leggja serligan dent á sosialisering av barninum – tað, at øll eru við, tó uttan at køva áræðið og evnir hjá einstaka barninum.

Gudrun er samd í, at eitt samstarv millum skúla og barnagarð átti at verið kring alt landið. Hon peikar á týdningin, sum liggur í hesum fyrstu árinum í einum mannalívi.

- Um viljin er tilstaðar, so fær mann dygd burturúr. Og hendan dygdin hevur ávirkan framyvir – tað er so heilt vist! Alt verður lært í teimum fyrstu árunum, ella sagt annarleiðis, so verður grundin løgd hesi fyrstu árini. Tá ið tað snýr seg um innlæring, tá er tað lættari byggja upp, um grundin er væl løgd. Men, um tað verður farið lætt um barnið, so er vandi fyri at ein líkasæla mótvegis innlæring kann koma í!

Gudrun W. Rasmussen slær fast, at dygd skal vera í arbeiðinum. Eitt møguligt samstarv skal vera væl umhugsað. Men somuleiðis heldur hon tað verða eitt slag av líkasælu, at samstarvið er sum tað er, tí talan er jú um framtíðin.